# Magnus Heinason - Túrfrágreiðing
## Yvirlitstroling-Føroyabanki. Túrur nr. 1034
### Tíðarskeið 9.-13. september 2010

**Fólk frá Havstovuni:** Regin Kristiansen, Rógvi Mouritsen og Petur Steingrund.

**Ábyrgd:** Eyðfinn Magnussen, Fróðskaparsetur Føroya

**Endamál**: Hetta var tann triði og seinasti túrurin av heyst-yvirlitstrolingunum í ár. Høvuðsendamálið við túrinum var at fáa til vega tilfar, ið skal nýtast í stovnsmetingunum av toski, hýsu og upsa, t.e. veiða í vekt og í tali, longdarbýti, vektbýti, aldursbýti, kynsbýti og kynsbúning av nevndu sløgum. Vekt, tal og longdarbýti varð skrásett fyri øll fiskasløg, ið vórðu veidd á túrinum. Eisini vóru gjørdar magakanningar av toski, hýsu og upsa. Umframt at fiska, vóru mátingar eisini gjørdar av salti, hita og plankton á Bankanum.

**Reiðskapur:** 116 fóts kassatrol við 40 mm meskum í posanum og við vanligum grunni. Breitlarnir vóru 60 m og 120 m, Steinhamns lemmar, Seastar hitamátari, Sea-Bird CTD og WP2 glúpur.

**Um túrin:** Farið varð av Havnini 8. september kl. 21.00. Trolið var koyrt út fyrstu ferð 9. september kl. 06.55. Seinasta CTD-støðin varð tikin 13. september kl. 17.05. Alla støðir vórðu tiknar.

**Nær eru prøvarnir upparbeiddir:** Magarnir vórðu kannaðir umborð. Úrslitini frá Imponatorskipanini eru rættað og løgd í databasuna.

**Fyribilsúrslit**

**Toskur:** Tilsamans vóru fingin 833 kg, av toski á Føroyabanka hendan túrin móti 1014 kg í 2009. Hetta er ein minking av veiðuni í vekt uppá 21% samanborið við í fjør. *Mynd 1* vísir miðalkonditiónsfaktorin á toskinum. Konditiónsfaktorurin sigur okkum, hvussu feitur fiskurin er. Miðalkonditiónsfaktorurin hendan túrin var 1,07, sum er 1% lægri enn í fjør, tá konditiónsfaktorurin var 1,08. *Mynd 2* vísir miðalveiðuna av toski í heyst-yvirlitstrolingunum á Føroyabanka árini 1991 og frameftir. Hendan túrin var miðalveiðan 29 kg pr. fiskitíma. Hetta eru 21% minni enn árið fyri, tá veiðan var 36 kg fyri hvønn fiskitíma. Samanborið við onnur ár var veiðan tó lítil. Í 2002 var miðalveiðan 249 kg pr. fiskitíma.




***Mynd 1**: Miðalkonditiónsfaktor (vekt/longd$^3$) hjá toski á heyst-yvirlitstrolingini á Føroyabanka árini 1992-2010.*




***Mynd 2**: Miðalveiðan av toski (kg/tíma) á heyst-yvirlitstrolingini á Føroyabanka árini 1991-2010.*

**Hýsa:** Í alt vórðu fingin 1.147 kg av hýsu. Hetta er ein minking upp á 40% samanborið við árið fyri. Miðalkonditiónsfaktorurin fyri samlaðu hýsuna var 0,96, sum er 5,1 % hægri enn í fjør (*Mynd 3*). *Mynd 4* vísir miðalveiðuna av hýsu, fingin á heyst-yvirlitstrolingini síðani 1991. Her sæst, at veiðan øll árini til 2002 var støðugt vaksandi. Í 2002 var veiðan av hýsu 1.210 kg pr. fiskitíma. Men eftir hetta hevur veiðan verið støðugt minkandi. Soleiðis var eisini í ár. Miðalveiðan av hýsu hendan túrin var einans 40 kg pr. fiskitíma, móti 71 kg í 2009. Hetta er ein minking uppá 40%.




***Mynd 3****: Miðalkonditiónsfaktor (vekt/longd*$^3$*) hjá hýsu á heyst-yvirlitstrolingini á Føroyabanka árini 1996-2010.*




***Mynd 4****: Miðalveiðan av hýsu (kg/tíma) á heyst-yvirlitstrolingini á Føroyabanka árini 1991–2009.*

**Upsi:** Samlaða veiðan av upsa var 284 kg. Hetta er 10% minni enn upsaveiðan í fjør. Miðalkonditións-faktorurin á upsanum var 1,0, sum er 7% hægri enn fyri einum ári síðani. Á *mynd 6* er víst miðalveiðan av upsa á heyst-yvirlitstrolingunum á Føroyabanka frá árunum 1991 og frameftir. Hendan túrin var miðalveiðan 10 kg pr. tóv, sum bert er umleið helvtin av veiðuni fyri einum ári síðani (18 kg pr. tóv).




***Mynd 5****: Miðalkonditiónsfaktor (vekt/longd$^3$) hjá upsa á heyst-yvirlitstrolingini á Føroyabanka árini 1996 til 2010.*




***Mynd 6****: Miðalveiðan av upsa (kg/tíma) á heyst-yvirlitstrolingini á Føroyabanka árini 1991-2010.*

Tórshavn 20. desember 2010

Eyðfinn Magnussen____________________